So eru vit aftur her. Í dag fara vit at stoyta ljós. Sjálvandi kann ein jú bara fara inn í ein handil og *keypa* sær eitt ljós. Men stuttligast er nú at gera tað sjálvur. Tú hevur kanska roynt at gjørt ljós fyrr? Tann lættasti hátturin er at dryppa stearindropar úr tendraðum ljósastubbum niður í eitt glas av vatni, til ljósið er vaksið til ta stødd, tú ynskir. Men ljósini, vit fara at gera í dag, eru eitt sindur torførari at gera; so best er, um onkur vaksin er nærhendis at leggja lag á, umframt at ansa eftir, at eldur ikki kemur í. Vit greiða tær eisini frá, hvussu ein kann pynta ljós við «bivoksi». Hetta er sera lætt at gera og sær avbøra vakurt út. Kanska skuldi tú givið onkrum eitt stoytt, pyntað ljós í jólagávu?!!

Í morgin er luciadagur. At ganga lucia er hesi seinastu árini vorðið vanligt fleiri staðni í Føroyum, serstakliga á skúlum. Visti tú, at ein eigur at ganga á ein serstakan hátt, tá ein gongur lucia? Gangið frameftir, tvey og tvey. Lyftið fyrst vinstra fót og setið hann fram um høgra, soleiðis at helvtin av fotinum kemur framum. Lyftið síðani høgra fót og setið hann fram við síðuna av vinstra; høgra fót helvtina fram um vinstra; vinstra við síðuna av høgra, o.s.fr. So, nú er bert eftir at royna seg í morgin!'

JÓLAFYRIBRIGDI

Ljós

Á eini veitslu tann myrkasta partin av árinum er ikki heilt burturvið at nyta ljós, og ljósini høvdu t.d. hjá romverjunum stóran týdning á veitslum hesa ársins tíð. Men enn større týdning fingu ljósini, eftir at kristindomurin kom. Jesus kallaði seg nevniliga «Heimsins ljós». Síðurin, at seta ljós í oll vindeygu stavar frá katólskari tíð, tí í tí katólsku kirkjuni hava ljósini allar tíðir nógv at siga.

Lucia

Lucia var upprunaliga eitt halgimenni, sum livdi í 3. old á Sikiliu, og hennara serliga eydkenni var ljósið.

Í Norðurlondum hevði uppruni hennara ikki so stóran týdning, annað enn at minnidagur hennara var tann sami sum stytsti dagurin í árinum. (Hetta var áðrenn vit fingu tíðarrokningina, vit hava í dagt. Á hesum sama degi fingu fólk í kirkjuni ár undan ári boð um at fasta í triggjar dagar.

Náttin áðrenn hetta kallaðist «lusse-náttin», tí at soleiðis úttaladu norðbúgvar navn hennara. Serliga í Svøriki hava tey havt nógvar siðir í sambandi við «lusse-náttina», har bæði fólk og fæ fingu gott at eta. Næsta dag gekk tað unga fólkið hús úr húsi syngjandi luciavísur, latin í seyðaskinn og við sót í andlitinum.

Seinni er hesin siður broyttur. Serliga kladnadraktin er vorðin øðrvísi. Fyrimyndin til hesa broyting er tann týska «Christkindlein», sum hevur hvítan kjóla og ljós í hárinum.

Ljósastoyting

Av gomlum ljósastubbum

Tilfar: Ljósastubbar, nakrir metrar av sterkum veiki (fæst í málingahandlum), blikk, avskornir mjólkarpakkar, stokkar.

Legg ljósastubbarnar í blikkini – eitt blikk til hvønn lit! Fyll eina grytu við vatni, set blikkini í og hita grytuna. (Ljós eru gjørd av stearini og paraffini. Hesi evni eru eldkvæm, og tí er neyðugt at hita blikkini í vatni!!) Tá stubbarnir eru smeltaðir, tekur tú teir gomlu veikirnar upp úr.

Tak nú fyrsta mjólkarpakkan. Ger eitt hol í botnin, og lat veikin igjøgnum. Bind síðani ein knut á niðara endan av veikinum, og bind ovara endan um ein stokk, sum tú leggur á mjólkarpakkan. (Sí tekningina).

Nú kanst tú byrja at stoyta ljósdeiggið niður í mjólkarpakkaformin; men rør í blikkinum, áðrenn tú byrjar. Stoyt uml. 2 cm í senn, og syrg fyri, at fyrsta lagið er stivnað, áðrenn næsta verður latið í. Annars koma blaðrur í ljósið. Tú velur sjálvur, um ljósið skal vera einsella fleirlitt.

Tá ljósið skal úr formínum, hellir tú tað undir heitt vatn, so fer formurin lættari av.

Dyppihátturin

Tilfar: (Til uml. 50 ljós).

3,7 kg stearin, 1 kg paraffin, 0,3 kg bivoks. Umleið 15 m av veiki, 1 høg metaldós (avger hæddina á ljósunum!), 1 stór gryta, fleiri stavir.

Fyll kókað vatn í metaldosina, so hon verður næstan full. Fyll restina av dósini upp til kantin við smeltaðu ljósdeiggi (stearin, paraffin, bivoks), sum nú flytur oman á vatninum.

Set dósina í eina grytu við kókaðum vatni. (Lat grytuna standa á einari heitari plátu!)

Tak ein stav, og legg 2-3 petti av veiki tvørtur um hann. Dyppa veikirnar í dósina. Tá tú tekur teir upp aftur, hevur eitt lag av ljósadeiggjinum lagt seg rundan um teir. Hang stavin onkustaðni, so ljóslagið kann stivna. Tak tær ein nyggjan stav við veikinum á, og dyppa teir niður í dósina. Tá ljóslagið á fyrstu veikunum er stivnað, dyppar tú teir aftur niður í dósina. Á henda hátt arbeiðir tú við fleiri ljósum í senn, og skjótari verður íbúgt. Tú avger sjálvur, hvussu tjukk ljósini skulu vera.

Pynt av ljósum

Tilfar: Litað bivoks, hvít (ella ljós) ljós. Gerið myndamynstur úr bivoksi og set tey á ljósini. Bivoksið rennur saman við ljósinum av hitanum frá hond tini. Mynstrini kunnu t.d. vera eitt træ, eitt nissuhovd, ein kavamaður o.s.fr.



JÓLAHALD Í FØROYUM FYRR

Ljós

Í summum bygdum var tað serstakt arbeiði at stoyta kertuljós til jóla. Ein ávisur maður var ljósastoypari ár um ár, og hesin mátti vera nærlagdur, tí hetta arbeiðið varð hildið at vera sera vandaligt. Tollakssmessudagur var fleiri staðni fastur dagur at stoyta kertur.

Jólini skuldu vera ljós og hugnalig, og jólaaftan plagdu tey at seta ljós í oll vindeygu, serliga í húsum har børn vóru. Tá var ofta hugnaligt at hyggja út gjøgnum bygdina, og fleiri staðni var farið út fyri dyr at vita, hvørji vindeygu mundu vera vakrast. Nógv høvdu fyri at lata ljósini brenna alt kvøldið og náttina við. Jólamorgun fóru tey ofta tíðliga upp at tendra kertunar.

Hugsað var eisini um djórini. Síður var t.d. í Múla, at á jólum skuldu neytini ikki standa myrk. Móti kvøldi jólaaftan var ein lampa sett inn í fjósið og hetta kvøldið fingu neytini harafturat heitt vatn at drekka.

At fara í kirkju á jólum var hildið at vera serliga hátíðarligt, ikki minst orsakað av øllum kertuljósunum, sum tá vóru tendrað, t.d. út fyri hvønn stólin, á altarinum og í ljósakrúnuni. Ymiskt var, nær ljósini vórðu tendrað fyrstu ferð, antin tað var jólaaftan ella fyrsta jóladag, men vist var, at nógv børn gleddust til hetta kvøld og hildu tað vera hátíðarligastu løtur í árinum.

JÓLAHALD Í ØÐRUM LONDUM

Ongland

Einar 14 dagar fyri jól pynta flestu familjur húsini við kristtyrnivið og ketum av fagurlitum pappiri. Smá jólatre við lítlum ljósum eru at siggja í vindeygunum, og mistilteinar verða eisini nógv nýttir til jólapynt.

Mistilteinurin hevur verið gatufarur og umgirdur av gandi síðan áðrenn Jesu føðing. Tann best kenda halgisagan sigur frá, at hann einaferð var eitt træ og ikki ein snultiplanta sum nú. Av ti at Jesu krossur var burtur úr trænum hjá mistilteinunum, skammaðist tað so nógv, at tað ongantáð aftur vaks úr jørðini. Tí gróa tað nú bert á bulinum hjá øðrum trøum.

Hóast hetta verður sagt, at mistilteinurin ber eyðnu við sær. Í Onglandi hevur ein og hvør loyvi at kyssa tann, ið undir tí stendur. Ofta syrgir ein ungur maður fyri, at genta, honum hóvar, kemur at standa undir greinini. Tað øvugta ber eisini til.

Ongland er eisini væl kent fyri sín «Christmas Pudding», ein jólabuding, ið etin verður í flestu familjum á jólum. Ymiskt er tilfarið – t.d. neir, rosinur, pomerans skæl og konjakk – og kokan má bókast í goðari tíð áðrenn jólini; hon skal nevniliga eftir summum uppskriftum standa í 8 mánaðir, áðrenn hon verður etin. Øll í familjum eiga at hava rørt í henni og kunnu tá samstundis ynskja sær okkurt.

Kavamaðurin

Einaferð var ein kavamaður, sum stoð á einum heyggi við andlitinum vendum ímóti sólsetri. Tað var ein rættiliga finur kavamaður, so høgur sum ein hermaður, og nógv tjúkkri. Hann hevði tvey glaspetti til eygu, ein stein til nos, eitt petti av svørtum viði til munn, og í hondini hevði hann ein dygdargóðan knortlutan stav.

Men hann hevði als eingi klæði, heldur ongan hatt, og vindurin ovast á heygginum var so bitandi kaldur, sum vindur kann vera.

«Sum eg eri kaldur. Eg eri so kaldur sum ísur», segði kavamaðurin. «Men hasin reydligi himmalin sær heitur út». So hann tók fóturnar upp frá jørðini og fór at tramp, tramp, trampandi oman brekkuna yvir ímóti sólsetrinum.

Ogvuliga skjótt kom hann fram á eina sigovnarakonu, sum var í einum oføra reyðum kastiturriklæði. «Á, hatta sær út til at vera heitt! Hatta má eg hava», hugsaði kavamaðurin. So fór hann yvir til sigovnarakonuna og segði: «Gev mær hatta reyða kastiturriklæði».

«Nei, og kortanei! Eg kann ikki vera tað fyri-uttan á hesum vetrarliga degi», svaraði konan, «eg eri nóg køld sum er».

«Køld!» ropti jólamaðurin við eini sera illsligari rødd. «Ert tú so køld sum eg; tí fari eg at ivast í! Ert tú køld innan sum uttan? Ert tú gjørd av ísi allan vegin igjøgnum?».

«Nei, tað hugsi eg ikki», mutlaði konan, sum gjørdist heitari og heitari av ótta.

«Iðan, gev mær títt reyða kastiturriklæði beinan vegin, ella eg slái teg við mínum dygdargóða, knortluta stavi».

So fór konan úr sínum reyða kastiturriklæði, meðan hon alla tíðina gramdi seg, og gav kavamanninum tað. Hann legði tað um herðarnar uttan so mikið sum at takka fyri, og fór tramp, tramp, trampandi oman brekkuna. Og tann frystandi konan fylgdi aftan á honum.

Skjótt kom kavamaðurin fram á ein bóndaflók, sum var í einum longum, reyðum, ullintum vøttum frá ommu sini.

«Á, sum teir siggja heitir út! Teir má eg hava», hugsaði kavamaðurin. So fór hann yvir til bóndaflókin og segði: «Gev mær hasar reyðu, ullintu vøttirnar».

«Nei, og kortanei!» segði bóndaflókurin. «Omma mín eigur teir. Hon lænti mær teir, tí at eg vár so kaldur um fingrarnar».

«Kaldur!» geylaði kavamaðurin. «Eru fingrar tínir líka kaldir sum mínir? Tí fari eg at ivast í. Eru hendur tínar og armar tínir vorðnir til is allan vegin igjøgnum?»

«Nei, tað hugsi eg ikki», mutlaði bóndaflókurin.

«Iðan, gev mær hasar reyðu vøtturnar beinan vegin, ella eg slái teg við mínum dygdargóða, knortluta stavi».

So hálaði bóndaflókurin teir heitu vøttirnar av, meðan hann gramdi seg alla tíðina. Og kavamaðurin fór, í teir, uttan so mikið sum at takka fyri. Síðan fór hann tramp, tramp, trampandi oman gjøgnum brekkuna. Og konan og bóndaflókurin fylgdu aftan á honum.

Eina løtu seinni kom hann fram á ein skikkiligan sjóræna, sum var í einari tjúkkari, reyðari sjóræn-arahúgvu við einum skúgvi niður eftir ryggin-um.

«Á, handan sær heit út! Hana má eg hava», segði kavamaðurin. So fór hann yvir til tann skikkiliga sjóræna-ran og segði: «Gev mær hasa reyðu húgvuna við skúgvinum».

«Nei, og kortanei!» segði sjóræna-rin. «Eg hevði verið so oføra kaldur um kovdið, um eg gav tær hana».

«Kaldur um høvdið!» ropti kavamaðurin við torurødd. Er høvd títt so kalt sum mitt, tí fari eg at ivast í! Er heili tín gjørdur av kava og bein tíni av harðum ísi allan vegin igjøgnum?».

«Nei, tað hugsi eg ikki», mutlaði tann skikkiligi sjó-rænarin.

«Iðan, gev mær hasa reyðu húgvuna við skúgvi-num beinanvegin, ella



leggi eg á teg við mínum dygdargóða, knortluta stavi».

Nú var sjóræna-rin ogvuliga keddur av, at hann var vorðin skikkiligur, men honum dámdi einki hendan knortluta stavin, so hann gav honum sína reyðu húgvu við skúgvi. Kavamaðurin setti hana á høvdið uttan so mikið sum at takka fyri. Síðan fór hann tramp, tramp, trampandi oman brekkuna við skúgvi-num dumsandi upp og niður eftir ryggin-um. Og sigovnarakonan, bóndaflókurin og tann skikkiligi sjóræna-rin fylgdu aftan á honum.

At enda var hann komin oman alla brekkuna, har skúlin í bygdini lá. Skúlastjórin stóð á gáttini og hugdi at sólsetrinum. Hann roykti pípu, og á fótunum hevði hann tveir reyðar floyals-inniskógvar.

«Á, hasir siggja heitir út! Hasar má eg hava», segði jólamaðurin. So hann fór yvir til skúlastjóran og segði: «Gev mær hasar reyðu inniskógvarnar».

«Sjálvandi. Um tú vilt hava teir», segði skúla-stjórin. «Tú ert vælkomin at taka teir. Í dag er alt ov kalt at trampa berføttur í kring uttandúrs», og hann boygdi seg niður og tók inniskógvarnar av, og har stóð hann í ófora reyðum hosum, sum vóru tjúkkar, ullintar og hondbundnar.

«Á, hasar siggja heitar út! Gev mær tær!» segði jólamaðurin.

«Sjálvandi, um tygum vilja hava tær», segði skúlastjórin. «Men tygum mugu koma inn um. Tað ber ikki til hjá mær at fara úr sokkunum her í durinum. Komið og standið á mottuni».

So kom kavamaðurin inn í durin at standa á mottuni.

«Skunda tær við hasum hosunum. Fóturnar hjá mær eru so kaldar sum harður ísur», murraði í honum.

«Tað eri eg keddur um at hoyra», segði skúlastjórin. «Men eg havi eitt heitt reytt teppi, sum hongur til turkingar á ovninum. Komið innar. Setið tygum niður á handa stólin við eldin. Leggið køldu fótur tygara á handa flogva reyða krakkin, og latið meg balla hetta reyða teppið rundan um bein tygara».

So fór kavamaðurin inn í skúlastovuna, setir seg á stólin við tann heita eldin og leggi fóturnar á tann reyða krakkin. Skúlastjórin ballað tað reyðu teppið fleiri ferðir rundan um bein hansara. (Og alt hetta með-an sigovnarakonan, bóndaflókurin og tann skikkiligi sjóræna-rin kagaðu inn gjøgnum rutin!

«Eru tygum vorðin heitari?» spurdi skúlastjórin.

«Nei, eg eri so kaldur sum eitt ísfjall».

«Farið nærri eldinum».

Síðan skumpaði skúla-stjórin stólin nærri eldi-num, men kavamaðurin takkaði ikki við einum orði.

«Eru tygum vorðin heitari nú?».

«Nei. Eg eri so kaldur sum ein steinur. Fótur minar kennast sum isvatn».

«Farið nærri eldinum», segði skúlastjórin og skumpaði stólin enn nærri eldinum. «Soleiðis! Eru tygum heitari nú?».

«Nei, nei, nei! Eg eri kaldari enn nakrantíð. Fót-urnar eru kensluleysar. Beinini hjá mær eru kensluleys. Ryggurin hjá mær er kensluleysur».

Síðani skumpaði skúla-stjórin stólin heilt upp í mótí ovninum. «Eru tygum ikki heitari nú?».

Men einki svar kom, utt-an eitt hátt, sleipið ljóð, og dripp, dripp, drippið av svørtum kavavatni.

«Á, gud!» teskaði kava-maðurin við eini gurglandi rødd. «Eg havi mist min dygdargóða, knortluta stav. Reyðu inniskógvar minir flóta inn í oskuskuff-una. Vættir mínir svimja ikring í einum løki á gólvi-num. Kastiturriklæði mitt er burtur. Reyða húgva mín við skúgvinum er um at gláa, gláa niður. Høvd mitt er um at fara fara

Skvalt! Skvatl! Skvatl!

«Hatta var endin á hon-um», segði skúlastjórin, og hann fór uttar eftir tvøg-uni.

Síðani komu sigovnara-konan, bóndaflókurin og tann skikkiligi sjóræna-rin eftir lutum sínum, vundu teir og lótu teir torna á ovninum. Skúlastjórin legði inniskógvar sínar mitt ímillum og hongdi tað reyða teppið yvir ryggin á stólinum.

Síðan tók hann tann dygdargóða, knortluta stavin upp og skøra-ði upp í eldinum.

Umsett eftir Mabel Mar-lowe, «The Snow-man» úr bókini «An Oxford Book of Christmas Stories».